inni - trygt og ómaksleyst til hús

Handilsbygningur í miðbýnum í Klaksvík

Bygningurin er í 2 hæddum á 120 fermetrar. Byggiár 1939. Í niðaru hædd eru handilshøli, goymslurúm, køkur, wc og fýrrúm. Í ovaru hædd eru handilshøli, skrivstova og goymslurúm. Møguleiki er fyri at keypa vørulagrið. Bygningurin stendur sera væl fyri í miðbýnum í Klaksvík og kann nýtast til bæði skrivstovu og handil. Prísuppskot kr. 3.500.000,00.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Starvslýsing

Náttarvakt Heimatænastan Suðuroy

Almanna- og Heilsumálaráðið hevur avgjørt at seta í verk eina royndarskipan við koyrandi náttarvakt í Suðuroy.

Vit sóknast eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum ella heilsuhjálparum til eitt tíðaravmarkað starv at arbeiða í skiftandi vaktum, skjótast gjørligt.
Arbeiðið umfatar røkt og umsorgan til heimabúgvandi borgarar og til búfólkini á eldrasambýlunum í oynni.

Førleiki
- røktarfakligar royndir
- evni til at arbeiða sjálvstøðugt við ábyrgd
- førur fyri at loysa bráfengis uppgávur
- førur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum
- góð samstarvs- og samskiftisevni
- koyrikort til persónbil

Vit bjóða:
- eitt starv við møguleika at menna starvsinnihaldið
- eitt spennandi arbeiðspláss við nógvum røktarfakligum uppgávum
- eitt gott arbeiðsumhvørvi

Setan, umsókn og freist
Starvið verður sett 1. november 2006 ella skjótast tilber.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.
Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Heimatænastan í Suðuroy.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til økisleiðaran ella varaleiðaran á tlf. 373907.

Send eina umsókn við prógvi, autorisatión og møguligum viðmælum til

Heimatænastan Suðuroy
Stílað: Jeanna í Lágabø, økisleiðari
900 Vágur

Umsóknarfreistin er 27. oktober 2006.

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

sansir.fo

Gerst handilslærlingur
hjá BR Leikum

Vit bjóða:
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum
- Løn sambært galdandi sáttmála við S&K

Vit vænta at tú ert:
Samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi, arbeiðsom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

Kunning um BR Leikur:
Í BR Leikur starvast 5 fólk.
BR Leikur byrjaði fyri 17 árum síðani og hevur eitt tætt samstarv við BR Legetøj í Danmark , Svoríki,
Norra og Finlandi.

Skúlagongd:
Skúlagongdin fer fram í Danmark, Handelsfagskolen i Odder. Í samstarv við BR legetøj í Danmark fáa okkara lærlingar ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving.

Krøv:
Fyri at gerast lærlingur í BR krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Lærlingurin skal byrja 30 okt.

Hevur hetta tín áhuga, send so eina skrivliga umsókn innan 18 okt. til:

BR Leikur
Boks 1215
110 Tórshavn

ella á teldupost: brleikur@post.olivant.fo

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja 319707 og spyr eftir Ritu

VIKUBLADIÐ

BR Leikur • Smyrilsvegur 7 • Tórshavn • Tlf. 319707 / 319929 • Faks.319229